# Sjúkrahúsleiðslan fullmannað

**Lisbeth Lykke Bruun tók 1. september við sum sjúlrarøktarstjóri, og fríggjadagin skipaði Landssjúkrahúsið fyri móttøku fyri henni**

MÓTTØKA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*




*Lisbeth Lykke Bruun er nýggi sjúkrarøktarstjórin á Landssjúkrahúsinum*

Nýggi sjúkrarøktarstjórin, Lisbeth Lykke Bruun, tók við starvinum 1. september, og fríggjadagin varð so skipað fyri móttøku á Landssjúkrahúsinum fyri henni.

Hon er triðji liðurin í trístreingjaðu leiðsluni á Landssjúkrahúsinum, sum umfatar Allan Skaalum, sjúkrahússtjóra, Tummas í Garði, læknastjóra og so altso Lisbeth Lykke Bruun, sjúkrarøktarstjóra.

Í røðuni, sum Allan Skaalum, sjúkrahússtjóri, helt í sambandi við móttøkuna, segði hann millum annað:

- Tá tú eftir eina byrjunarfasu, har tú ert førd fram og presenterað á sjúkrahúsinum – og har er hendan móttøkan ein týðandi partur – hevur tú havt møguleikan at skapa tær eina meining av uppgávunum á Landssjúkrahúsinum, sum eru mangar, ymiskar og ikki minst spennandi.

Sjálv takkaði Lisbeth Lykke Bruun fyri hjartaligu móttøkuna, sum hon hevur fingið á Landssjúkrahúsinum.

- Her er nóg mikið at tríva í, føli eg, og eg eri ikki komin brotpart av vegnum enn, segði Lisbeth Lykke Bruun og vísti til føroyska málið.



*Allan Skaalum, sjúkrahússtjóri, helt sjálvandi røðu fyri nýggja sjúkrarøktarstjóranum*



*Samlaða leiðslan á Landssjúkrahúsinum: Tummas í Garði, læknastjóri, Allan Skaalum, sjúkrahússtjóri og Lisbeth Lykke Bruun, sjúkrarøktarstjóri*



*Okkurt leskiligt var sjálvandi til tey, sum vóru møtt upp at heilsa upp á nýggja sjúkrarøktarstjóran*



*Lisbeth Lykke Bruun fekk sjálvandi eisini blómutyssi á degnum*